FAROE UNITED seafood

# Góðskuleiðari

Søkt verður eftir góðskuleiðara til United Seafood á Toftum, at byrja so skjótt sum gjørligt. United Seafood á Toftum framleiðir saltfisk til miðjarðarhavslondini serliga Spania.

**Góðskuleiðarin hevur ábyrgd av hesum økjum:**

- Innaneftirlitsskipanin á virkinum
- HACCP
- Samskifti við almennar heilsumyndugleikar
- Reingerð og reinføri
- Heilsufrøðiligar starvsskipanir
- Reglugerðir (vørulýsingar og merkingar)
- Etikettskipan
- Góðskuskrásetingar og góðskuskjøl
- Tekniskt kundasamstarv
- Klagur og klaguviðgerð
- Skrásetingar og eftirlit í rakstrinum í samráð við virkisleiðaran.

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**

- Fiskivinnuútbúgving
- Teoretiska vitan um HACCP
- Kunnleika til nýtsluskipanir t.d. Access, Word, Excel og Axapta
- Góðan førleika í enskum máli

**Vit kunna bjóða:**

- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ivan Hansen, tlf. 447326 ella Guðrið Andorsdóttir, tlf. 355555.
Umsóknin skal sendast áðrenn 1. juli 2005 til

**Faroe Seafood**
att. Guðrið Andorsdóttir
Postboks 218
FO-110 Tórshavn

# Lýsing

**um matrikulering av vøtnum og áum í markatalsbygdini Sandur, sum eisini fevnir um Skopun.**

Til tess at staðfesta ognar- og nýtslurættindi til vøtn og áir í Sands bygd er neyðugt við eigindómsdómi.

Í hesum sambandi hevur Matrikulstovan vent sær til Vinnumálaráðið, sum í skrivi dagf. 14. februar í ár hevur givið Matrikulstovuni loyvi at matrikulera vøtnini á Sandi sambært grein 38 í løgtingslóg frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v. m.

Boðað verður tí til fundar í Ungmannafelagshúsunum á Sandi týsdagin 28. juni í ár kl. 11.00 at viðgera málið um ognarrættin til vøtn og áir í Sands bygd.

Tá eigindómsskráin er fullfíggjað, verður matrikulin sendur Landsstýrinum, ið við almennari stevning leggur sak við Føroya rætt móti øllum og einum, ið hava mótmæli móti tí gjørda matrikli, og at teir í honum lýstu eigarar verða skrivaðir í tingbókina sum eigarar av óheftum eigindómi.

Rættarmálið verður havt í rætti allar vanligar tingdagar, frá tí degi stevningin fyrstu ferð er lýst, og til stevnufreistin er farin.

Bygdaráðini á Sandi og í Skopun skulu hvør sær velja tveir mans at hjálpa Matrikulstovuni við at greiða eigindómsviðurskiftini.

MATRIKULSTOVAN 1945

**Matrikulstovan,**
*tann 10. juni 2005*
Øssur Á. Midjord
matrikulstjóri

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Universitetsútbúgvingar á Náttúruvísindadeildini

Í summar verða lesandi tikin upp til tvær verkfrøðingaútbúgvingar á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Tað eru bachelorútbúgvingarnar í kolvetnisverkfrøði (eisini nevnt "Oljuverkfrøði") og ravmagnsverkfrøði (eisini nevnt "Elektro- og KT-verkfrøði"). Útbúgvingarnar eru skipaðar í modulum, og tí ber eisini til at melda seg til og taka prógv í einstøkum lærugreinum. Meir fæst at vita um útbúgvingarnar á heimasíðuni www.nvd.fo

**Upptøkutreytir**
Fyri at sleppa inn krevst stødd-, alis- og evnafrøði á ávikavist stigi A, B og C. Aðrar fortreytir kunnu koma upp á tal eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri.

**Umsóknarbløð**
Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni www.nvd.fo ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Postboks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er *1. juli 2005.* Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 15. juli 2005.

Meir fæst at vita um lestrarmøguleikarnar við at vitja á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni 3 í Tórshavn ella við at ringja á telefon 352550.

Sosialurin

# ÚTBERARAR

Søkt verður eftir fólki at bera bløð út í **KLAKSVÍK**

Áhugað ringið tel. 35 14 05 frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: utbering@prent.fo



PRENTMIÐSTØÐIN
Smyrilsvegur 13
Postboks 3314
FO-110 Tórshavn

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# *Arbeiðshandskar*

***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

Beinleiðis frá framleiðara



**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

ShapeWorks™
Independent Distributor

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit



Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 422367 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin